Flógv móttøka í Eysturoynni

Runavík, Sosialurin: Eysturoyingar vilja fegnir hava Sosialin í oynna. Tað vísti luttøkan, tá blaðið fríggjadagin bjóðaði til til móttøku í nýggju redaktiónshølunum í Runavík. Eini 200 fólk vitjaðu nýggju blaðhølini og tey nutu lekra pinnamatin frá Poul Rustin úr Fuglafirði. Fingu svalandi vín úr góðum drúvum sunnan av meginlandinum, sum eina heilsan frá sólini meðan vátakavin tøssaði alt upp uttanfyri og drukku bjór frá báðum føroysku bryggjarínunum.

Redaktiónsleiðslan á Sosialinum saman við nýggja manninum. Frá vinstru Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri, Vilmund Jacobsen, journalistur, Justinus Leivsson Eidesgaard, tíðindaleiðari og Eirikur Lindenskov, blaðstjóri.

Mynd: Jens Kr. Vang.

NÝGGJ DEILD

Justinus Leivsson Eidesgaard

Sosialurin hevur reint manningarliga nú eisini fingið fótin fastan í Eysturoynni og vanligar dagar skulu eitt ella tvey starvsfólk manna redaktiónin í Eysturoynni.

Og hvørji vóru so tey, sum vildu bjóða starvsfólki á Sosialinum vælkomnum. Fólk komu úr allari oynni. Umboð vóru fyri allar stættir og talurnar vóru nógvar.

Borgarstjórin í Runavík, Rodmund Nielsen bjóðaið blaðnum vælkomnum og fjaldi ikki útyvir, at hann var fegin um, at Sosialurin endiliga hevði fingið skrivstovu í Eysturoynni. Og fyri at vera eitt sindur diplomatiskur, so segði hann, at fyri seg var tað líka mikið hvat blað kom í oynna, bara tey komu.

Stuðlar hjá blaðnum gjøgnum mong ár vóru eisini møttir upp. Frits Joensen, lærari í Fuglafirði greiddi frá, at tá hann var smádrongur og tá ongin ivi var um, at Sosialurin var eitt javnaðarblað, tá var barnaheim hansara einasta hús í Fuglafirði, sum helt Sosialin. Pápin, Teodor Johannesen helt boðskapin í Sosialinum vera so týðningarmiklan, at hann slerdi blaðið upp í bygdini sum veggavís, soleiðis at fuglfirðingar kundu lesa. Í dag er Sosialurin í teim flestu húsarhøldunumí Fuglafirði.

Dan Reinert Petersen, tingmaður, hevur eisini verið ein stríðsmaður fyri blaðið í farnum tíðum og í dag. Hann mintist í røðu sína á hvussu illa tað mangan stóð til figgjarliga hjá blaðnum, so illa, at stuðlar úr egnum lumma rindaðu til blaðið fyri at tí skuldi vera lív lagað. Og so fegnaðist hann um góðu gongdina hjá blaðnum. Hann helt blaðið í dag vera so óheft, at tað var mest sum ov mikið fyri javnaðarpolitikkarar.

Grør um gangandi fót

Ábyrgdarblaðstjórin á Sosialinum, Jan Müller bjóðaði vælkomin og helt røðu. Hann segði:

–Lat tað verða sagt beinanvegin, at stigið hjá Sosialinum í Eysturoynni hevur tvey endamál: nevniliga at halda lív í okkum sjálvum og menna ávísina og kunna geva okkara ikast til menningina av allari oynni. Vit eru fegnir um at hava fingið so góðar umstøður her hjá Karlu og arbeiðarafelagnum Hæddini við góðum grannum til allar síðir, men skulu samstundis minna á, at vit eru her fyri alla oynna og ikki bert fyri hetta økið ella henda fjørðin. Tó so – her er so nógv virksemi, at bara tað at skula dekka tað, sum her hendir, er nærum nóg mikið hjá einum fólki.

–Má siga, at tað er ótrúligt, hvussu nógv virksemi er her á fjørðinum, men fara vit kring alla oynna, so er støðan alla staðni tann sama – her ýðir við arbeiðsplássum – glaðum og nøgdum fólkum. At frítíðarvirksemi eisini er í sínum besta blóma, her hugsi eg ikki minst um tey mongu ítróttarfeløgini, er jú eisini eitt sunnheitstekin: at fólkið trívist. Tá arbeiði er til allar hendur og somu hendur eru virknar á vølli og í høll, so má tað sigast at vera trivnaður.

–Men lívið her er eisini annað enn arbeiðspláss og ítróttarvøllir. Tað er skúli, og tað er mentan. Eisini her er nógv virksemi. Skúladepilin á Kambsdali er eitt gott prógv um tað. Og

Rodmund Nielsen, borgastjóri í Runavík prátar her sparikassastjóran Tummas Jacobsen.

Mynd: Jens Kr. Vang

Journalisturin, reiðarin og polittikarin. Vilmund prátar her við Jónsvein Knudsen og Sámal Petur í Grund.

Mynd: Jens Kr. Vang

nýggja mentanarhúsið í Fuglafirði. Fyri ikki at tosa um felagshúsini á Oyrabakka, sum hava hýst mongum tiltaki.

–Hetta er eisini svarið uppá, hví Sosialurin sum blað vil seta seg niður her tykkara millum. Vit vilja vera partur av hesi menning, segði Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri.

Menning ikki bara fiskur og fótbóltur

–Men tá vit tosa um menning, eiga vit ikki at gloyma, at hetta er ikki bara fiskur og fótbóltur. Menningin í einum samfelag, eini oyggj ella bygd snýr seg um øll menniskju, um øll tey fólk her búgva, eisini tey, sum vit ikki seta í samband við fisk ella fótbólt. Tí eiga vit ikki at gloyma tey, sum kanska hava ringast við at tala søk sína, børnini og tey ungu og tey gomlu og veiku. Tess betri børnini og tey gomlu hava tað, tess betri hevur samfelagið tað eisini. Tí vil uppgávan hjá einum blað sum Sosialinum eins nógv vera at seta ljóskastaran á umstøðurnar hjá hesum ættarliðum, segði hann.

–Í byrjanini verður Vilmund Jacobsen her á redaktiónini, men ætlanin er, at fólk frá øðrum redaktiónum eisini skulu arbeiða her, og tey, sum eru her skulu arbeiða aðrastaðni. Á henda hátt ætla vit at menna okkara egna fólk og deildir. Geva teimum fjølbroyttar og ymiskar avbjóðingar. Spennandi avbjóðingar í ymsum umhvørvi. Tí skulu tit ikki vera kløkk, um tað ein dag sita trý folk her og taka sær av t.d. eini stórari handils- og ídnaðarnum inntøkur við at koma inn í oynna. Vit vóna, at fyritøkur, feløg og stovnar og einstaklingar fara at brúka blaðið sum lýsingamiðil eisini og ikki bara tá talan er um at fáa upplýsingar og tíðindi út. Vit seta tí okkara álit á, at fleiri eysturoyingar bæði fara at lesa og brúka okkara blað við teimum møguleikum tað gevur segði Jan Müller, blaðstjóri og nevndi fyri mongu fólkunum, sum vóru við til móttøkuna, at tað gjørdi ikki støðuna verri, at tað í dag arbeiða fleiri eysturoyingar á blaðnum. Blaðstjórin ynskti Vilmundi Jacobsen góða eydnu við nýggju rúmligu og snotuligu hølunum og takkaði eysturoyingum fyri at hava tikið so væl ímóti blaðnum, segði Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri.

Gamli læknin á Skála, fuglfirðingurin Sigvald Kristiansen, t.h. prátar her við Napoleon hansen av Toftum.

Mynd: Jens Kr. Vang

Frá vinstru Óli Petersen, teknari á Skála, Dan Reinert Petersen og Frits Johannsens, báðir búsitandi í Fuglafirði

Mynd: Jens Kr. Vang

Havnatindur fór at leka:

Støðan var hættislig

Støðan var hættislig, tá Havnatindur, sum var staddur á Norðhavinum, sunnumorgunin fór at leka illa. Ikki fyrr enn tyrlan við tógvið stríð fekk pumpur umborð, megnaðu teir at halda lens

LEKI

Stefan í Skorini

Sunnumorgunin klokkan 8.30 fekk Vaktar- og Bjargingartænastan fráboðan um, at línuskipið Havnatindur úr Klaksvík var farið at leka. Havnatindur var tá átta fjórðingar norður úr Rivtanga, ið er norðasta staðið á Eysturoynni.

Skipið tók sjógv inn í maskinrúmið, eftir at tað hevði fingið ein sjógv, og manningin, sum taldi tríggjar mans, sendi neyðarkall til MRCC á Marinustøðini.

Tjaldrið, sum var trettan fjórðingar burtur, fekk boðini og setti beina kós móti Havnatindi. Klokkan 9.50 var Tjaldrið hjá neyðstadda skipinum, og tá var Søkin eisini komin til.

Tá Tjaldrið hoyrdi neyðarkallið, tyktist tað ógvuliga álvarsamt, tí tað ljóðaði, at báturin var um at søkka.

–Brotini vóru so stór, og vindurin var so nógvur, at tað var ikki ráðiligt hjá okkum at seta pumpur umborð á Havnatind, sigur Jákup Müller, skipari á Tjaldrinum. Tyrlan varð eisini boðsend, og hon skuldi síðani royna at fáa pumpurnar umborð.

Vindmegin var einar 20 metrar um sekundið, og tað var ógvuliga óslætt á sjónum. Aldan var tíggju metrar til hæddar.

Royndin miseydnast

Klokkan 9.22 er tyrlan hjá Havnatindi, og hálvan tíma seinni roynir hon at seta pumpur umborð. Fyrsta royndin miseydnast, tí tað var ov óslætt í sjónum. Tað vísti seg at vera ógvuliga torfort at raka tann lítla bátin við pumpuni.

Tyrlan hjá Atlantic Airways fer síðani til Klaksvíkar at fáa meira brennievni umborð.

Klokkan 11 er tyrlan aftur hjá skipinum og ger enn eina royndt at fáa pumpur umborð. Hesuferð eydnast, og stutt fyri middag eru pumpurnar farnar í verk umborð á Havnatindi.

–Manningin á Havnatindi var ógvuliga dugnalig og akrobatisk, at hon megnaði at taka ímóti pumpunum í ringa veðrinum, heldur skiparin á Tjaldrinum.

Hann leggur afturat, at tað var tyrlan, sum var høvuðsorsøkin til, at hendingin spældi væl av hóast alt, tí Tjaldrið kundi ikki veita Havnatindi pumpur í ringa veðrinum.

Klokkan 12.04 verður boðað frá, at vatnstøðan umborð minkar skjótt, og at pumpurnar rigga, sum tær skulu.

Hálvanannan tíma seinni er tamarhald fingið á støðuni, og Tjaldrið gjørdi seg til at sleipa Havnatind aftur til lands. Tjaldrið sleipaði Havnatind suður ígjøgnum Svínoyarfjørð, og klokkan 18.50 var lagt at í Klaksvík.

Manningin ikki í vanda

Jákup Müller sigur, at um tað stóð um lív hjá manningini, hevði Tjaldrið sett bátin út og tikið manningina umborð. Skiparin metti tó ikki, at tað var ráðiligt at flyta pumpur við lítlum báti millum bátarnar, tí tað er torfort at arbeiða við tungum lutum í so ringum sjógvi.

Havnatindur er bygdur í Klaksvík í 1947, og hann er úr eik og furu. Ólavur Waag Høgnesen eigur línuskipið.

Les, hvat skiparin sigur um tilburðin á síðu 13.

Havnatindur og Tjaldrið við bryggju í Klaksvík. Línuskipið fór at leka illa sunnumorgunin, og tyrlan mátti seta pumpur umborð á bátin. Tjaldrið sleipaði Havnatind aftur á Klaksvík